á skúlatrøð

# Páskaroynd

8. og 9.flokkur

# Mannagongdir í sambans við skrivligu royndirnar:

- Møtið í seinasta lagi 15. min. fyri ásettu tíðina
- Havið oyralurt/headset við
- Fartelefonir skulu sløkkjast og leggjast í telefonkassa, har tit koma inn
- Internetið er opið til royndarhaldið, og allir hjálparmiðlar eru loyvdir. Hetta merkir, at næmingurin kann reika frítt á internetinum og kann hava lærubøkur, gamlar uppgávur, frymlar og annað tilfar við til royndarhaldið
- Næmingurin hevur loyvi at samskifta við vaktirnar í royndarhølunum. Alt annað samskifti á netinum og sínamillum er ikki loyvt
- Verið sitandi alla tíðina, meðan royndin er
- Biðið vaktina um loyvi, um tit av eini ella aðrari ørsøk skulu út úr royndarhølinum
- Havið fyrilit og hugsið um ikki at órógva hini
- Hóast internetið er loyvdur hjálparmiðil, so er týdningarmikið at minnast til, at tú skalt gera tína egnu uppgávu. T.v.s., at tað er ikki loyvt at kopiera uppgávur av netinum. Sjálvandi kanst tú fáa hugskot og íblástur av netinum, og tú kanst eisini endurgeva tekst, um tú vísir til kelduna

# Uppseting av framseting

- Skriva við ”Times New Roman”
- Yvirskrift við stødd 16, og tekstin annars við stødd 12
- Reglumillumrúm 1.5
- Reglubrot skulu vísast við dupultum regluskifti
- Breddin skal vera líka í høgru og vinstru síðu

# Longd av framseting

Longdin er **vegleiðandi**. Avrikið verður fyrst og fremst mett eftir innihaldinum.

Føroyskt og danskt:

8. fl. 3000 – 3700 tekn við millumrúmum
9. fl. 3700 – 4900 tekn við millumrúmum
10. fl. 4900 – 6100 tekn við millumrúmum

Enskt:

8. fl. 2400 – 3000 tekn við millumrúmum
9. fl. 2800 – 3700 tekn við millumrúmum
10. fl. 3700 – 6100 tekn við millumrúmum

Allir hjálparmiðlar eru loyvdir.
Gevið tykkum tíð at lesa framsetingina væl og virðiliga, so úrslitið gerst so gott sum gjørligt.

## Støddfrøði (greiðslurokning)

Í greiðslurokning verða uppgávurnar loystar við hond. Greiðslurokning verður skrivað á pappír og kann gerast við blýanti. Minst til vælútgjørt pennahús, lummaroknara og gulu handbókina.

Navn, flokkur, lærari og dagfesting skal tilskilast á øllum ørkunum, umframt at øll innlatin ørk skulu vera leypandi talmerkt.

Allir hjálparmiðlar eru loyvdir. Tó er ikki loyvt at nýta avritingarforrit t.d. (Photomath) til loysn av uppgávum í støddfrøði.

## Støddfrøði (fimisrokning)

Næmingurin hevur ikki loyvi til at brúka lummaroknara (heldur ikki roknara á teldu) ella avritingarforrit í fimisrokning.

# Tíðarkarmar fyri páskaroyndina 2020

## 8. flokkur – 11. – 16. mars

| Páskaroyndin 2020 | **8. flokkur** |
|---|---|
| **Føroyskt**<br>Mikudagur 11. mars | 08:15 – 09:45 Máluppgáva<br>09:45 – 10:15 Steðgur<br>10:15 – 13:15 Framseting |
| **Danskt**<br>Hósdagur 12. mars | 08:15 – 09:45 Máluppgáva<br>09:45 – 10:15 Steðgur<br>10:15 – 13:15 Framseting |
| **Enskt**<br>Fríggjadagur 13. mars | 08:15 – 09:45 Máluppgáva<br>09:45 – 10:15 Steðgur<br>10:15 – 13:15 Framseting |
| **Støddfrøði**<br>Mánadagur 16. mars | 08:15 – 09:15 Fimisrokning<br>09:15 – 09:45 Steðgur<br>09:45 – 13:15 Greiðslurokning |

**8. flokkur er til roynd í fimleikahallum skúlans.**

# Tíðarkarmar fyri páskaroyndina 2020

# 9. flokkur – 17. – 20. mars.

| Páskaroyndin 2020 | **9. flokkur** |
|---|---|
| **Føroyskt**<br>**Týsdagur 17. mars** | 08:15 – 09:45 Máluppgáva<br>09:45 – 10:15 Steðgur<br>10:15 – 13:15 Framseting |
| **Danskt**<br>**Mikudagur 18. mars** | 08:15 – 09:45 Máluppgáva<br>09:45 – 10:15 Steðgur<br>10:15 – 13:15 Framseting |
| **Enskt**<br>**Hósdagur 19. mars** | 08:15 – 09:45 Máluppgáva<br>09:45 – 10:15 Steðgur<br>10:15 – 13:15 Framseting |
| **Støddfrøði**<br>**Fríggjadagur 20-mars** | 08:15 – 09:15 Fimisrokning<br>09:15 – 09:45 Steðgur<br>09:45 – 13:15 Greiðslurokning |

**9. flokkur er til roynd í fimleikahallum skúlans.**